# El-Service nógv virksemi uttanlands

**Í løtuni arbeiða fólk hjá El-Service á Karstensen-skipasmiðju í Skagen umborð á nótaskipi til Thyberøn, sum skal verða liðugt í november. Nýbygningurin Thor Omega er handaður Thor í Hósvík og næsta stóra verkætlanin í Skagen, har El-Service er við, er nýbygningur til P/F Vinnuna í Gøtu**





Í løtuni eru umleið 40 fólk í starvi hjá fyritøkuni El-Service á Skála. Flestu av hesum eru knýtt at verkætlanum, sum fyritøkan er partur av uttanlands.

Stjórin í El-Service, John Eli Olsen, sigur, at tey høvdu roknað við minni virksemi á heimamarknaðinum seinni í ár og næsta ár, og tað sær eisini út til at verða so.

- Tí fevnir meginparturin av tí, vit hava at gera nú, um arbeiði uttanlands.

John Eli vísir á, at tað hevur eydnast væl hjá fyritøkuni at leita sær út um landoddarnar, og hetta hevur eisini verið eitt sereyðkenni hjá El-Service næstan síðan byrjan.

– Tað, sum vit fáast mest við, er at veita alt tað elektriska umborð á skipum uttan sjálva navigatiónsútgerðina á brúnni.

Hetta merkir, sigur stjórin, at fyritøkan letur eina fulla installatión við høvuðstalvum, undirtalvum, startkaðlum og ávaringartalvum, umframt alt tað elektriska á sjálvari verksmiðjuni.

– Vit hava eisini ein serkunnleika, tá ræður um stýring av ymiskum skipanum.

John Eli sigur, at stóra uppgávan hjá teimum næsta ár verður nýbygningurin til P/F Vinnuna í Gøtu.

– Hetta skal tó ikki skiljast soleiðis, at vit ikki kunnu átaka okkum annað arbeiði, nú vit vóna, at skipasmiðjan Mest og Thor klára at gera ein nýggjan sáttmála um fleiri skip, sigur hann.

## Nógv uttanlands

Seinastu 18 árini hevur El-Service havt tætt samstarv við Karstensen-skipasmiðju í Skagen, og henda mannagongdin við heildarloysnum fyri alt tað elektriska gongur aftur hvørja ferð.

– Tað hevur verið eitt sindur langt millum nýbygningarnar, sum eru smíðaðir í Føroyum seinastu árini, men El-Service hevur tó verið við til at bygt tilsamans átta skip saman við Tórshavnar Skipasmiðju.

John Eli sigur, at felagið er virkið bæði á sjógvi og landi, innansum uttanlands.

– Vit hava fólk í Chili til nýggju Norðborg, sum skal leverast til Klaksvíkar. Uppgávan er at hjálpa reiðarínum við eftirliti av el-innleggingum og veitingum. Tá nýbygningurin Gitte Henning er liðugur í novembur, verður byrjað uppá nýggja Trónd í Gøtu. Hesi skip verða bygd á Karstensens Skipasmiðjuni í Skagen – við okkara luttøku, sigur stjórin í El-Service.

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

